Tiltøk

Katolska kirkjan
Týsdag 28. des. kl. 11.30 messa í Kerit. Kl. 14.30 jólaveitsla fyri børnini.
Mikudag 29. des. kl. 11.30 messa í Kerit.
Hósdag 30. des. kl. 11.30 messa í Kerit.
Fríggjadag 31. des. kl. 11.30 messa í Kerit.
Nýggjársdag 1. jan. kl. 11 hámessa í kirkjuni v/Thomas Pulickijil, prestur.
Sunnudag 2. jan. kl. 11 hámessa í kirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Mánadag 3. jan. kl. 17.30 messa í Kerit.
Týsdag 4. jan. kl. 17.30 messa í Kerit.

31. desember
Havnar kirkja: kl. 16
Ann D. Hansen
Viðareiði: kl. 17
Elsa Funding
Gøtu: kl. 17
Hanus á Gørðum
Árnafjørður: kl. 19
Magnus Brahé Jørgensen
Kunoy: kl. 20.15
Magnus Brahé Jørgensen
Christianskirkjan: kl. 20
Hanus á Gørðum
Gøtu: kl. 17
Hanus á Gørðum
Norðskála: kl. 21
Emil Olsen
Eiði: kl. 23.15
Emil Olsen
Tvøroyrar kirkja: kl. 17 aftankvirra við ljósatendring. Kl. 18 verður aftansangur og andakt við Jónsvein Bech.

Nýggjársdag
Havnar kirkja: kl. 11 Lestur Kl. 18 Uni Næs, altarg.
Hoyvíkar kirkja: kl. 11
Sonja Klein. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið í øllum kirkjum í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi
Vesturkirkjan: kl. 11
Derhard Jógvansson. Altarg. Talvan gongur fyri Bíbliufelagnum.
Argja kirkja: kl. 19
Derhard Jógvansson. Altarg. Talvan gongur fyri Bíbliufelagnum.
Hvannasund: kl. 12
Elsa Funding
Øravík: kl. 12
Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið
Fámjin: kl. 18
Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið
Christianskirkjan: kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen, altarg.
Christianskirkjan: kl. 11
Magnus B Jørgensen, altarg.
Kunoy: kl. 12
Hanus á Gørðum, altarg.
Gjógv: kl. 12
Emil Olsen, messa
Funningur: kl. 17
Emil Olsen, messa. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Danska Bíbliufelagið
Tvøroyrar kirkja: kl. 18 altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið

2. januar
Havnar kirkja: kl. 11
Ann D. Hansen
Hoyvíkar kirkja: kl. 11
Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11
Derhard Jógvansson
Argja kirkja: kl. 11
Bergur Debes Joensen
Kaldbak: kl. 12
Sverri Steinhólm, altarg.
Sørvágur: kl. 11
David Johannesen
Hvalba: kl. 12.30
Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið
Sandvík: kl. 18
Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri Bíbliufelagið
Árnafjørður: kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10
Magnus Brahé Jørgensen, andakt
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30
Magnus Brahé Jørgensen, andakt
Christianskirkjan: kl. 11
Hanus á Gørðum
Norðskála: kl. 12
Emil Olsen, messa

Filadelfia Tórshavn
Mánadagin 27. des. Onki bønarmøti.

Missiónshúsinum við Landavegin
2. januar møti kl. 18.

Hebron á Argjum
Mikudagur 29. des. kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur. Kl. 20 Bíbliutími og bønarløta, Djóni Thomassen talar um Rómbrævið.

Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting.
Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin

Tórshavnar Hvítusunnusamkoman
Eingin møtir verða aftur fyrr enn 9. jan. 2011.

Missiónshúsið í Skopun
Týsdagin kl. 17 jólafest fyri børn í øllum aldri.
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími. Jólafest fyri vaksin verður 9. jan. kl. 18. Øll eru vælkomin.

Keldan, Skálafirði
30. des. kl. 19
Nýggjársveitslan.

Meinigheitshúsið á Skála
29. des. kl 19 Jólafest fyri vaksin

Kambsdalur, Handilsskúlin
Týskvøldið kl. 20
Bønar- og uppbyggingarmøti.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Týsdag Jólafest fyri vaksin
Mikukvøldið kl. 20 Bíbiltími v/ Jóhannus Finsson.
Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091.

Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík
Mánakvøldið, 3. jóladag kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting
Mikukvøldið 29. des. kl. 19 Jóla og Nýttársfest tekning á tlf 597287, kostn. 50 kr.

Missiónshúsið í Vági
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

Tilhaldið í Tórsgøtu
tlf. 316491/286491
Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður stongt frá 20. des. til og við 7. jan. 2011. Eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár, og takk fyri eitt hendingarríkt ár verður ynskt øllum Føroya fólki.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Gongutúrur
Mikukvøldið 29. des. vitjar gongubólkurin Mariukirkjuna í Havn. Vit møtast í Mariukirkjuni kl. 19. Tilmelding á tlf. 302425, torsinfo@torshavn.fo ella á Kunningarstovuni.

Pensionistafelagið í Havn
Tlf. 222733
finnurj@post.olivant.fo

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Blákrossbúðin, Kongagøta 10, Tórshavn
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

Blákrossbúðin, Heiðavegur 32, Tórshavn
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17:30 og leygardag frá kl 10-13.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

Landsfelag Pensjónista
Tróndargøta 13, Tórshavn
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

Dagtilhaldið í Nólsoy
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu
Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará.
Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið á Toftum
Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin

Dagtilhaldið í Fuglafirði
Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.

Tilhaldið Sóljan
Klaksvíksvegur 35
Klaksvík · tlf. 459091
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

Dagtilhaldið Blákollan á Oyri
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælkomin.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.
Ogur møtast aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

BERIN – Sjálvhjálparbólkar
fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin.
info@berin.fo - www.berin.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

Spælistovan
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-12 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

Giktafelag Føroya
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

Lymfødemfelagið
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

Køliaki Felag Føroyar
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.
Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið.
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

Listasavnið á Sandi
er stongt allan oktober mánaða, men letur upp aftur í november. Frá november til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.

Felagið fyri lesi- og skriviveik
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimumið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum
MBF Húsið Íslandsvegur 10c,
FO-100 Tórshavn
hoyr@post.olivant.fo
www.hoyribrek.fo

framhald á næstu síðu

ÚTBJÓÐING

Umbygging av røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi umbygging av røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út í heildararbeiðstøku, grundað á skipanaruppskot, og umfatar framhaldandi projektering og útinning av verkætlanini. Talan er um umleið 700 m2 tilsamans á 0. hædd og 1. hædd í bygningi B. Arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi í viku 50 í 2011.

Kravt verður av teim fyritøkum, ið ynskja at bjóða, at tær kunnu vísa á, at tær hava neyðuga førleikan til at gera arbeiðið til lítar innan fyri ásetta tíðarkarmin. Metingarstøðið verður nærri útgreinað í útbjóðingarskrivi til tilboðsgevararnar.

Útbjóðingartilfarið, sum er talgilt, kann bíleggjast frá Landsverki frá mánadegnum, 03.01.2011.

Lisitatiónin verður á Landsverki mánadagin, 21.02.2011 kl. 15.00.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 290 851, Faks 340 801, kr@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleika-uppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.